**Nr. 98/2014**

**Bill Justinussen**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um ólógligan innflutning av rúsevnum, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvørji átøk ger tollvaldið fyri at steðga ólógligum innflutningi av rúsevnum?
2. Hvussu nógvar sonevndar hash-hundar hevur tollvaldið tøkar?
3. Hvussu nógv kostar útvegan og rakstur av einum hash-hundi?
4. Hvørji átøk ger tollvaldið, umframt tey vanligu, á flogvøllinum og umborð á Norrønu?
5. Hvussu verða átøkini samskipað við aðrar myndugleikar, serliga løgregluna?

**Viðmerkingar**
Tíverri er støðan viðvíkjandi rúsevnamisnýtslu versnað seinnu árini, hóast fyribyrgingarátøkini eru styrkt. Hugflog teirra, sum standa aftan fyri rúsevnahandil, tykist støðugt at vera eitt fet ella fleiri framman fyri myndugleikarnar. Neyðugt er tí alla tíðina at herða eftirlit og átøk. Tollvaldið og løgreglan hava størstu ábyrgdina á økinum. Serliga tollvaldið hevur heimildir, sum eiga at minka um møguleikarnar fyri innflutningi. Men ivasamt er, um nóg mikið av orku og tilfeingi verður sett av til at røkja uppgávuna til fulnar. Tí er neyðugt at eftirhyggja verandi støðu fyri at staðfesta, hvussu stórur tørvurin er á eftirliti. Er tað so, at fleiri sonevndir hash-hundar kundu minkað um innflutningin, eiga beinanvegin stig at verða tikin til at fáa fleiri hundar.

Samskipanin millum myndugleikar hevur stóran týdning, fyri at átøkini skulu vera væleydnað. Tí eigur samskipanin støðugt at eftirmetast og broytingar gerast, har tørvurin er.

Tað er óneyðugt at endurtaka vanlukkuligu avleiðingarnar, sum rúsevni hava fyri serliga unga ættarliðið. Tí er eisini óneyðugt at nevna týdningin, sum átøkini hava fyri at verja ungdóm okkara móti samvitskuleysum bakmonnum, sum við persónligum vinningi fyri eyga ikki blunka við at oyðileggja ung fólk og drepa framtíðardreymar teirra.

**Á Løgtingi, 15. mai 2015**

Bill Justinussen